NSÍ–GÍ 1-0 (1-):

# NSÍ hóraði akkurát undan

**At Popczynski er skaddur ber við sær, at gøtumenn ikki megna at umseta leikliga bróðurpartin til mál og harvið stig**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Einki var at siga til tað, at teir á heimaliðnum í Runavík vóru fegnir, og at teir úr Gøtu iðraðu seg, tá ið dómarin hevði bríklsað fyri síðstu ferð.

NSÍ hevði fingið øll stigini, og harvið eru teir framvegis við í stríðnum um heiðursmerkini og Europa Cup plássini. GÍ tapti enn eina ferð, og harvið eru teir á veg ímóti vánaligasta kappingarárinum nógvu tey seinastu árini.

Tað kom bara eitt mál, og tað fekk NSÍ stutt undan steðginum. Talan var um gávu frá gøtumonnum. NSÍ roynd at leypa á var av, tá ið Janik, sum saman við Súna Olsen stríddist væl á sentrala miðvøllinum, legði á brotsteigar markinum upp á tvørs til Helga L. Petersen, sum smekkaði til. Bólturin støkk í stólpan og út frá aftur til Ian Højgaard, sum noyddist at draga eina ferð, áðrenn hann við fløtum skoti sendi í málið.

Upplagdu málmøguleikarnir kundu teljast á aðrari hondini. Áslakur R. Petersen, sum var í høgru í sera framrættaðu GÍ uppstillingini, kiksaði fluktskot fyri opnum máli, eftir at Símun Samuelsen hevði lagt innfyri úr vinstru. Tá vóru 20 minuttir farnir, og tveir minuttir seinni endurtók søgan seg í hinum endanum. Hesa ferð var tað Helgi L. Petersen, sum kiksaði fluktskotið fyri opnum máli, eftir at Sjúrður Jacobsen hevði lagt innfyri úr vinstru.

Í 2. hálvleiki hevði Súni Olsen besta møguleikan, tá ið hann varð spældur leysur í brotsteiginum og eitt vet til høgru. Tað tóktist so ógvuliga lætt at bjarga hjá Jens Martini Knudsen, sum var júst á rætta plássinum. Soleiðis var tað hvørja ferð. Jens Martin toygdi seg onga ferðina, tí tað var ikki neyðugt. Men tað var týðuligt, at tað kom sera væl við hjá NSÍ, at teir høvdu so royndan málverja og liðformann, sum støðugt helt liðfeløgunum til.

Besti NSÍ møguleikin í 2. hálvleiki var tá ið Andy Olsen sneiddi seg til baklinjuna í vinstru og legði út frá í brotsteigin, men skotroyndin hjá Helga L. Petersen varð blokerað.

## Álopskendir

Gøtumenn vístu beinanvegin, at teir vóru ikki komnir til Runavíkar fyri at verja egið mál í góðveðrinum. Teir vóru í 3-4-3 útgangsstøðu, og teir vóru leikliga fyri tað mesta eitt vet omaná. Bartal og Poul fingu báðir tíðliga í 1. hálvleiki gult kort, og tað líka sum lá í luftini, at ein óheppin takling afturat kundi kosta óheppið gult kort og harvið útvísing, men teir báðir og Leivur Hansen vóru sannførandi og nýttu allar sínar royndir.

Hjá NSÍ var tað handikapp, at Jónstein Petersen, sum plagar at finna væl saman við Sjúrða Jacobsen og sum plagar at vera turboin í vinstra borði, ikki var við hesa ferð. Fleiri av krossbóltunum hjá GÍ vórðu lagdir innfyri úr høgru, men tað gjørdist ongantíð vandamikið. Í bestu árunum hjá Símuni Petur Justinussen høvdu ivaleyst nógvar vandamiklar stútroyndir verið ímóti NSÍ málinum. Hesa ferðina var tað bara ein. Bárður á Lakjuni, sum var miðframherji, stútaði eftir frísparksinnlegg úr høgru, stútarin var góður, men Jens Martin hevði tak á støðuni.

Sum seinna umfarið leið tóktist tað sum um GÍ spælararnir fingu betri tamarhald á spælinum. Miðverjarnir luttóku í uppbyggjandi partinum saman við Súna Olsen og Janik, og teir fingu pláss til tað.

NSÍ liðið hevði alt sum tað var hug til at taka seg eitt vet aftur fyri at verja leiðsluna, og tað eydnaðist. Óli Hansen og Messias góvu ongantíð framrættaðu gøtumonnunum plássið, sum teir tóktust hava fyri neyðini, um tað skuldi eydnast hjá teimum.

Hevði Popczynski í fullgóðari venjing verið fram ímóti NSÍ brotsteiginum, so hevði tað heilt víst borið til at temja, snara sær á og royna ímóti málinum ella at spæla viðspælarar leysar, men so langt kom tað ongantíð. NSÍ verjan var væl skipað og tøtt, og teir gjørdu ikki stórvegis mistøk. Í hvussu so er gjørdu teir einki at tí slagnum, sum GÍ gjørdi stutt fyri hálvleik, og sum heimamenninir høvdu format til at gera nyttu burtur úr og harvið at skjóta málið, sum í síðsta enda vísti seg at vera nóg mikið til trý stig og harvið framvegis møguleika fyri heiðursmerkjum og kanska endurtøku av altjóða luttøkuni komandi ár.

Um gøtumenn skulu hugsa um altjóða fótbólt komandi ár, so mugu teir seta sítt álit á, at B36 verður meistari umframt at teir hava vunnið steypakappingina. Men eisini hvat hesum viðvíkur sær svart út hjá gøtumonnum í løtuni.

**Dysturin í tølum:**
**NSÍ-GÍ 1-0 (1-0)**
1-0: Ian Højgaard 41.
**Dómari:** Suni Johansen
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Messias Pereira, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard, Kári Hansen, Ian Højgaard (Rúni Rasmussen, 67.), Andy Olsen (Justinus R. Hansen, 67.) – Sonni L. Petersen (Bjarki Danielsen, 76.), Helgi L. Petersen
**Gult kort:** Messias Pereira, Bjarki Danielsen
**GÍ:** Jacek Przbylski – Bartal Eliasen, Poul Ennigarð, Leivur Hansen – Jónreid Dalheim, (Høgni Madsen, 76.), Súni Olsen, Zdzislaw Janik, Henning Jarnskor (Hanus Jacobsen, 62.) – Áslakur R. Petersen, Bárður á Lakjuni, Símun Samuelsen
**Gult kort:** Bartal Eliasen, Poul Ennigarð, Leivur Hansen


*Tað eydnaðist NSÍ at basa grannunum úr Gøtu, og harvið ogna sær trý stig í harða stríðnum um sessirnar beint undir oddinum*

B36-B71 3-1 (0-1):

# Sandoyingar sperdir

**B36 vann týdningarmiklu botnuppgerðina á B71 leygardagin, og sandoyingar eru nú ógvuliga sperdir í botninum í 2. deild**

2. DEILD
*Stefan í Skorini*

Í fjør spældi B71 upp- og niðurflytingardyst ímóti EB/Streymi, eftir at sandoyingar endaðu á øðrum plássi í 2. deild. Í ár stríðist liðið hinvegin í skeiva endanum av stigatalvuni, og eftir tapið leygardagin liggur B71 sera tungt í botninum í 2. deild.

Tað var annars útiliðið, sum legði seg framum, tá Páll á Reynatúgvu skoraði fyri B71. B36 misti bóltin á hálvuni hjá B71, sum setti eitt skjótálop í verk. B71 hevði nú yvirtal, og endin var, at Páll á Reynatúgvu gjørdist leysur við málverjanum, eftir at hann dróg framvið einum verjuleikara, og landsstýrismaðurin skoraði trygt. Hetta var beint fyri steðgin.

Fyrri hálvleikur var annars javnur, har B71 tó hevði havt fleiri opnar málmøguleikar.

## B36 tók yvir

Eftir steðgin var tað tó B36, sum stýrdi dystinum, og heimaliðið legði stórt trýst á B71 málið. Tíggju minuttir inn í seinna hálvleik eydnaðist tað B36 at javna.

Tórálvur Poulsen royndi seg við skoti, sum Valdemar Novicki í málinum hálvbjargaði. Bólturin datt út til Áka Mørk, sum langaði til frá brotsteigarmarkinum, og so var 1-1.

Hóast B36 hevði yvirvág, gekk tað ikki so væl at spæla seg fram til opnar málmøguleikar, og leingi sá út til, at dysturin fór at enda við javnleiki.

Men tá tólv minuttir vóru eftir at spæla, fekk B36 aftur mál. Hesuferð var tað Jón Brekku, sum áður hevur spælt við B71, ið skoraði. Dánjal Petur Johansen fangaði eitt innlegg úr vinstru við handaru stong og legði eftir jørð innfyri til Jón Brekku, ið stóð leysur í málteiginum, og hann hevði lætt við at skjóta B36 framum.

Bert tveir minuttir seinni var aftur galið í verjuni hjá B71. Dánjal Petur Johansen var fyrstur á einum hornasparki. Hann skoraði til 3-1, og so var dysturin í roynd og veru avgjørdur.

Hetta var ein sera kærkomin sigur hjá B36, sum hevur vunnið báðar dystirnar eftir steðgin, og havnarliðið fór eisini framvið LÍF í stigatalvuni.

Sandoyingar munnu hinvegin kenna seg sera sperdar í botninum, tí at nú eru bert trý stig niður til B68 á aftasta plássinum. B71 hevur eisini mist fólk í steðginum. Símun Hansen er farin til AB, og Mustapha Kamal Ndaw úr Gambia er farin av landinum aftur.

**B36-B71 3-1 (0-1)**
0-1: Páll á Reynatúgvu
1-1: Áki Mørk
2-1: Jón Brekku
3-1: Dánjal Petur Johansen



KÍ–EB/Streymur 4-1 (2-0):

# Hjalgrím var á toppinum

**EB/Streymur fekk beinanvegin tvey mál ímóti sær, og so bar ikki til at dúva upp á snarálopini, sum áður hava gjørt av við klaksvíkingar**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Tað er gott lag í Klaksvík, nú KÍ í kvøld fer vestur til Noregs at spæla í UEFA Cup ímóti gamla felagnum hjá Jákupi Mikkelsen, Molde. Sunnudagin segði KÍ heimaáskoðarunum, sum eftir vónbrotið í Vági ikki vóru so nógvir, sum teir onkra ferðina fyrr í ár hava verið, farvæl, og tað gjørdu teir við maner.

Hjalgrím Elttør var stóra hetjan í 4–1 sigrinum á EB/Streymi. Hann skoraði øll fýra málini, og harvið er hann, nú tveir teir fyrstu triðingarnir eru farnir av kappingarárinum, ovastur á skjúttaralistanum. Tað er merkisvert, tí eftir at KÍ hevði fingið Jacob Bymar til felagið tóktist ætlanin vera, at Hjalgrím skuldi vera miðvallari í vinstru, meðan Bymar skuldi hava Ova Nysted undir liðini á sær í álopinum. Eftir at belgiumaðurin stakk av, eru ætlanirnar broyttar. Nú er Ove Nysted, sum sunnudagin var álitisfullur liðformaður, í miðverjuni saman við Aleksander Djrodjevic, og teir funnu væl saman.

Eyðun Klakstein hevði fingið miðvallarplássið í vinstru, sum stóð tómt, nú Hjalgrím var farin fram í toppin, og hugflogsríki Klaksteinurin tók av. Sum í seinna umfarinum í heimadystinum ímóti GÍ, so var hann ofta upprunin til skjótt og hugflogsríkt samanspæl. At Ove Nysted var í verjuni, meðan smærri spælarar vóru har frammi, hevði við sær, at álopsspælið gekk fyri seg fram eftir vøllinum í staðin fyri í luftini. Atli Danielsen var mest framrættaði miðvallarin, og hann tóktist stórtrívast í hesum leiklutinum.

## Góða løtan

EB/Streymur tóktist ikki ætla at pakka seg niður allar 90 minuttirnar, sjálvt um teir í útgangsstøðuni bara høvdu Sorin Anghel á toppinum. Magni á Lakjuni, sum var eitt sindur skaðadarvaður og tók seg úr stríðnum miðskeiðis í seinna umfarinum, og Hans Pauli Samuelsen høvdu hug at stuðla álopsmanninum. Fyrsta korterið hevði EB/Streymur onkran møguleika, sum kundi havt borið mál við sær, um teir høvdu verið hepnir. Eitt nú sendi Sorin Anghel í samankomingina.

Spurningurin er so, hvussu tað hevði tørnað út, um royndirnar høvdu eydnast. Men tað var skjótt, at fyritreytirnar fyri endurtøku av avrikinum á norðoyastevnu fyri tveimum árum síðani vóru burtur, og so hevði EB/Streymur ikki so nógv av bjóða uppá, og í fyrstu atløgu mugu teir hyggja langt eftir fimta plássinum, sum teir fóru til Klaksvíkar fyri at fáa fatur á.

Trýstið á EB/Streyma verjuna var stórt, og teir vóru ikki nóg stinnir at halda ágrýtnu mótstøðumonnunum burtur. Tvey tey fyrstu málini luktaðu av mistøkum, og tá ið so Sorin Anghel fram ímóti endanum noyddist at taka seg burturúr, tí hann hevði trupulleikar við liðbondunum í fótliðnum, so varð púra greitt, at KÍ fór at vinna trivaligan sigur og harvið at tryggja sær øll seks stigini ímóti EB/Streymi í ár. Tað er eitt sindur merkisvert, tá ið samstundis verður havt í huga, at EB/Streymur hevur fingið øll seks stigini ímóti B36, sum fleiri ferðir í ár hevur farið heilt illa við KÍ.

## Málini

Eyðun Klakstein var meistari fyri uppspælinum undan fyrsta málinum. Hann sneiddi framvið verjuspælara, fór til baklinjuna og legði út frá til púra leysa Hjalgrím Elttør, sum takkaði fyri og sendi upp undir nettakið.

Tá ið Hjalgrím Elttør økti til 2–0, var tað Atli Danielsen, sum fekk tonna á innlegg úr høgru. Hjalgrím rann inn um verjuna og var tryggur, tá ið hann sendi framvið Gunnari á Steig. Í sambandi við 3–0 málið, tá ið seinna umfarið var meiri enn hálvrunnið, var Atli Danielsen aftur meistari fyri uppspælinum. Aftur hesa ferð eydnaðist at spæla Hjalgrím blankan, og aftur hesa ferð sveik málrevurin ikki.

Ronnie Samuelsen pyntaði um. Hann var rættuliga leysur í KÍ brotsteiginum, tá ið hann royndi ímóti málinum. Tað tóktist sum um klaksvíkingarnir hesa løtuna ikki tóku verjupartin í heilt sama álvara, sum teir verða noyddir at gera, tá ið teir hóskvøldið fara á vøllin í Molde.

Higartil hevur tað ikki eydnast hjá Jacob Bymar at fáa mál í KÍ troyggjuni. Fram ímóti dystarenda var tað um reppið, at tað eydnaðist. Bymar royndi við skoti, Gunnar á Steig hálvbjargaði og umvegis ein verjuspælara endaði bólturin hjá Hjalgrími Elttør, sum takkaði fyri. Tvær aðrar ferðirnar var um reppið, at Hjalgrím náddi fram og fekk stýrt bóltinum í kassan, men tað hevði líka sum verið ov nógv av tí góða!


*Hjalgrím Elttør skeyt seg upp á ovastu føroysku máltindarnar við fýra málum í Klaksvík*

**Dysturin í tølum:**
KÍ-EB/Streymur 4-1 (2-0)
1-0: Hjalgrím Elttør
2-0: Hjalgrím Elttør
3-0: Hjalgrím Elttør
3-1: Ronnie Samuelsen
4-1: Hjalgrím Elttør

**Dómari:** Dagfinn Olsen

**KÍ:** Kartin Joensen – Jan Andreasen, Ove Nysted, Alexandar Djordjevic, Harley Bertholdsen – Arnold Joensen, Jan Joensen (Allan Joensen, 56.), Atli Danielsen, Eyðun Klakstein – Jakob Bymar, Hjalgrím Elttør
Gult kort: Ove Nysted, Eyðun Klakstein
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Hallur Jacobsen (Gert Hansen, 46.), Andzrei Pacek, Egil á Bø, Esmar Eiðisgarð – Hans Pauli Samuelsen, Marni Djurhuus, Marek Vierzbicki, Ronnie Samuelsen, Magni á Lakjuni (Jákup Martin Joensen, 69.) – Sohrin Angel (Teitur Joensen, 76.)
Gult kort: Andzrei Pacek

# Vejle fyrstu stigini

**Christian Høgni Jacobsen tykist hava ilt við at fáa fótafesti á Vejle liðnum, har hann sunnudagin bara var seinna partin av seinna umfarinum**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Eftir stóra tapið í Køge næstsíðsta vikuskifti ráddi um hjá Vejle at fáa høvdið fyri seg aftur, tá ið teir sunnudagin høvdu vijtan av grannunum úr Fredericia, sum fyrrverandi Vejle venjarin, Ole Fritzen, hevur ábyrgdina av. Í fjør vann Fredericia báðar dystirnar ímóti Vejle, og samantaldi málmunurin var 7–1.

Men hesa ferð eydnaðist tað hjá Vejle. Í tropiska sólskininum og hitanum á vøllinum í Nørreskóginum sóu 1.249 áskoðarar longu eftir at seks minuttir vóru farnir Vejle skjóta sigursmálið. Málskjútti var miðvallarin Mads Beierholm, sum verður mettur at vera ein hin evnaríkasti ungi spælarin í næstbestu deildini.

Í 2. hálvleiki trýsti Fredericia fyri at javna, og teir raktu eina ferð í stólpan, men tað eydnaðist teimum ikki at fáa mál.

Christian Høgni Jacobsen var á Vejle beinkinum tríggjar teir fyrstu fjórðingarnar av tíðini. Í 68. minutti kom hann á vøllin. Hann loysti málskjúttan av.

Sunnudagin eigur Vejle torføra uppgávu á útivølli. Tá skulu teir spæla í Silkeborg, har niðurflytararnir hava fingið sera góða byrjan. Sunnudagin vunnu teir 2–1 á útivølli ímóti FC Nordjylland.

## Amager aftur á kortið

Í mong ár hevur dreymurin á Amager verið, at teir skulu vera eitt alternativ í superliguni til hini feløgini í Keypmannahavn. Tað munnu vera eini tjúgu ár síðani, at Kastrup og Fremad Amager skiftust um at bjóða seg fram í bestu deildini, uttan at tað eydnaðist teimum at býta seg føst.

Samanleggingar hava verið framdar fyri at styrkja um fíggjarliga og ítróttarliga grundarlagið. Tað hava ikki øll viðhaldsfólkini verið so fegin um. Grannafelagið er ikki altíð tað, sum viðhaldsfólkini halda mest av.

Hóast samanleggingar so hevur tað roynst illa á vøllinum. Men nú tykist ein glotti at hómast, og amagerkanarnir eru aftur farnir at droyma stórar dreymar.

Fremad Amager er nú fremsta felagið á Amager. Síðsta kappingarár fluttu teir úr triðju bestu og upp í næstbestu deildina. Úrslitini í tveimum teimum fyrstu umførunum hava verið so góð, sum tað hevur borið til. Fyrst vunnu teir 3–2 á Eysturbrúgv ímóti Skjold, og sunnudagin vunnu teir 3–1 á heimavølli ímóti FC Aarhus. Harvið eru teir millum oddaliðini, og so møta nógvir áskoðarar upp. Í dýrdarveðrinum sunnudagin vóru teir 1.229.

B93 tapti 3–1 á heimavølli ímóti AC Horsens og Johan B. Hansen, niðurflytararnir úr Køge, sum næstsíðst hølvaðu Vejle av, taptu 2–1 í Køge, Ølstykke vann 3–1 á útivølli ímóti Brønshøj, og Skjold fekk fyrstu stigini, tá ið teir vunnu 3–1 í Odense ímóti B1913.